## Lega fyri støk – Evnið “Søgur, ið mynda okkum”

Næsta vikuskifti, 14. til 16. mai, verður lega fyri støk á Zarepta í Vatnsoyrum.

Legan er fyri øll støk, ið eru 30 ár og eldri, bæði tey, ið eru vorðin støk, og tey, sum altíð hava verið tað. Børnini eru vælkomin við, og okkurt gott verður eisini fyri tey.

Í okkara samfelag hava støk nógvar møguleikar og avbjóðingar, ið onnur ikki hava, og kunnu tí hava gleði av at koma saman.

Endamálið við hesi leguni, ið hevur verið á Zarepta á hvørjum ári síðan 1999, er, at støk kunnu hugna sær saman og verða uppbygd andaliga. Evnið á leguni hesaferð verður

*Søgur, ið mynda okkum*. Á bíbliutímum og hugnaløtum fara vit at hugsavna okkum um hvussu tey, ið hava gingið undan okkum, kunnu hjálpa okkum á lívsleiðini saman við Harranum.

Legan byrjar fríggjakvøldið 14. mai kl. 19. og heldur fram til eftir døgurða sunnudagin 16. mai.

Tilmelding fer fram við at ringja til Eydnu Berg, tlf. 219651 ella 319651. Tilmeldingarfreistin er nú týsdagin, 11. mai 2010.

Vegna fyrireikarnar,
Eydna Berg
Unn Hentze
Poul F. Guttesen